24. februar 1998

# UMHVØRVISGÓÐKENNING AV KALDBAKS LAKSAALING

**(Tilrættað eftir hoyring)**

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann veita Kaldbaks Laksaaling umhvørvisgóðkenning til aling í Kaldbaksfirði. Støddin á alistøðini verður sett í loyvisbrævið til aling á sjónum, sum verður givin av Føroya Landsstýri.

Umhvørvisgóðkenningin er tíðaravmarkað til 5 ár frá tí degi, hon er almannakunngjørd.

Umsókn um at endurnýggja umhvørvisgóðkenningina skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í seinasta lagi eitt hálvt ár áðrenn henda umhvørvisgóðkenning er úti.

**Umsóknin**

Kaldbaks Laksaaling hevur tann 13. desember 1996 søkt um umhvørvisgóðkenning. Umsóknin er endurskoðað í einari nýggjari umsókn frá 25. juni 1997. Kaldbaks Laksaaling hevur rikið alistøð á staðnum síðani 1992, men hevur ikki havt nakra umhvørvisgóðkenning fyrr.

**Lýsing av alistøðini**

Í umsókníni um umhvørvisgóðkenning er tað upplýst, at alistøðin er samansett av 15 aliringum við einum ummáli á 60 metur hvør. Flatumálið er 283 m2. Dýpið á ringunum er 15 metur, so tilsamans er rúmmálið á hvørjum aliringi 4254 $m^3$. Tilsamans er rúmmálið 63.810 m3.

Framleiðslan av laksi hevur ligið millum 550-600 tons um árið í tíðarskeiðnum 1994-1996 og tann væntaða framleiðslan í 1997 er 600 tons.

Upplýst er í viðmerking til uppskotið um umhvørvisgóðkenningina, at alistøðin væntast at fáa um 30 aliringar og sostatt fær eitt rúmfang uppá 8508 m3. Harafturat verður sagt at framleiðslan væntast at gerast 1200 tons í ár 2000.

**Málsviðgerð**

Í sambandi við góðkenningina er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:

- Fyri at tálma fóðurspilli, sum kann dálkað umhvørvið við alistøðina, er ásettur ein hægst loyvdi fóðurkvotientur upp á 1,2.
- Fyri at tryggja gott vatnútskifti undir ringunum er tað sett fram krav um, at tað skulu vera minst 5 m millum havbotnin og tað niðasta av ringunum ella búðrunum.
- Fyri at minka um sjúkuvandan, og harvið nýtsluna av heilivági, er tað sett fram krav um, at fiskatættleikin í mesta lagi má vera 20 kg/m³.
- Harafturat er dentur lagdur á at deyður fiskur verður tikin upp hvønn dag

**Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum;**

1. **Innrætting**

1.1. Alistøðin skal liggja á góðkenda staðnum og lúka treytirnar, sum er settar í loyvinum frá Landsstýrinum.

1.2. Um alistøðin gevur týðandi árin á umhvørvið, kann Heilsufrøðiliga Starvsstovan krevja, at alistøðin verður flutt ella broytt soleiðis, at ávirkanin á umhvørvið verður innanfyri ásett mørk.

1.3. Tað skal í minsta lagi vera 5 m millum havbotn og tað niðasta av ringunum.

1.4. Fóður skal goymast á landi í lokaðum ílati, sum er innrættað til hetta endamál.

1.5. Heilivágur og kemikaliir, sum kunnu hava dálking við sær, skulu vera vard ímóti regni og vindi. Plássið skal vera læst fyri óviðkomandi, og møguligir lekar skulu ikki kunna koma út í umhvørvið, men skal kunna haldast aftur í uppsavningarbrunni.

1.6. Tað kann ikki goymast meiri fóður, kemikaliir e.a. úti á sjálvum brúkinum enn tað, sum svarar til nýtsluna í ein dag,

1.7. Spillvatn frá vatnklosettum o.t. í tilknýttum bygningum skal leiðast til rottanga ella reinsiverk og síðan í góðkenda útleiðing.

2. **Rakstur**

2.1. Fiskatættleikin í ringunum má ikki vera meira enn 20 kg/m³.

2.2. Deyður fiskur skal takast upp hvønn dag

2.3. Verður fiskurin slaktaður á alistøðini, skal hann blóðgast soleiðis, at alt blóð kann savnast í einum kari ella líknandi, og síðani skal blóðið sóttreinsast í hesum. Framferðarhátturin við sóttreinsanini skal góðkennast av Landsdjóralæknanum, sambært kunngerð nr. 96 frá 12. november 1991 um sóttreinsan av lívrunnum burturkasti, skolivatni og blóðvatni frá alivinnuni. Eftir sóttreinsanina skal blóðið leiðast út á streymasjógv soleiðis, at uppblandingin og transporturin frá staðnum hendir so skjótt sum møguligt. Øll sjónlig blóðslóð skal vera burtur í seinasta lagi 2 tímar eftir útleiðingina.

2.4. Fiskur má ikki reinsast á aliringunum ella har nærhendis.

2.5. Um tað gerst neyðugt at slakta allan fiskin í aliringunum, skal umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni beinanvegin kunnast um hetta.

2.6. Tað er ikki loyvt at brúka kemikaliir í ella við aliringarnar uttan serligt loyvi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.
2.7. Tað er ikki loyvt at impregnera nótir og net á ella við anleggið. Hetta skal gerast í einum virki, sum er góðkent til slíkt virksemi.
2.8. Tað er ikki loyvt at spula ella á annan hátt fáa avleiringar burtur undan anlegginum uttan eitt serligt loyvi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni frammanundan.

3. **Fóður**
3.1. Tað er bara loyvt at brúka turrfóður á anlegginum.
3.2. Evnini í fóðrinum skal kunna skjalprógvast við einari vørulýsing.
3.3. Fóðringing skal fara soleiðis fram, at spillið gerst minst møguligt.
3.4. Lutfallið millum tað brúktu nøgdina av fóðuri og tað framleiddu nøgdina av fiski má ikki verða størri enn 1,2.

4. **Burturkast**
4.1. Alt burturkast skal skiljast sundur í:
   a) Brennbart.
   b) Ikki brennbart.
   c) Vandamikið.
   d) Lívrunnið burturkast.
4.2. Tað, sum kann brennast og tað, sum ikki kann brennast eins og tað vandamikla burturkastið skal latast inn til KOB/IRF.
4.3. Lívrunnið burturkast, herímillum slógv, deyður fiskur og fóðurleivdir skal savnast saman, verða goymt og fáast av vegnum sambært kunngerð nr. 40 frá 1992 um lívrunnið burturkast frá alivinnuni. Hetta hevur við sær fylgjandi krøv:
   - Tað lívrunna burturkastið skal savnast saman og verða goymt í einum fullkomiliga tøttum kassa.
   - Kassin skal standa soleiðis, at hann lættliga kann umlastast, uttan at akfør koma inn á arbeiðsøkið hjá brúkinum.
   - Um burturkastið ikki verður viðgjørt á staðnum (súrløguviðgerð ella frysting), skal tað flytast dagliga til góðkendan móttakara.
   - Burturkast, sum inniheldur heiligvágsleivdir ella kemur frá neyðslakting, skal beinast burtur serskilt til brennistøðina.
   - Flutningur av burturkastinum skal fara fram í einum fullkomiliga tøttum flati.
   - Um eigarin sjálvur hevur flutningin um hendi, skal hann tryggja sær, at móttøkustaðið letur váttan fyri móttøkuna.
   - Flutningsakfarið skal sóttreinsast við hvørja avlasting.
4.4. Heilivágur og kemikaliuavlop skal verða goymt trygt í tøttum flati og á einum avlæstum stað, inntil tað verður latið inn til KOB/IRF.

5. **Óljóð**

Tað ekvivalenta óljóðnivoið í dB(A) frá brúkinum má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk í teimum nevndu tíðarskeiðunum:

| **Tíðarbil** | | **Øki 1** | **Øki 2** | **Øki 3** | **Øki 4** |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán.-frí. kl. | 07.00-18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leyg. kl. | 07.00-14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán.-frí. kl. | 18.00-22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leyg. kl. | 14.00-22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. kl. | 07.00-22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar kl. | 22.00-07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnaøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnaøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

Tað mestloyvda óljóðnivoið frá alibrúkinum mált innandura í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini.

6. **Luft- og ljósdálking**

6.1. Alt virksemi á alibrúkinum skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær lukt- ella støvampar í nærumhvørvinum.

6.2. Nýtsla av ljósum á alibrúkinum skal gerast soleiðis, at hetta ikki hevur við sær umhvørvisligan ampa.

7. **Innaneftirlit**

7.1. Eina ferð um mánaðin skal nøgdin av fóðurspilli og fækalium mátast yvir eitt 5-daga tíðarskeið. Hetta skal gerast av alaranum og nøgd og tíðspunkt skal skrivast upp í rakstrarjournalin. Nærri reglur fyri hesum verða latnar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

7.2. Eina ferð um árið skulu tað takast sedimentssýni undir og og rundan um havbrúki. Títtleikin av sýnunum kann verða broyttur av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

7.3. Hvar sýnini skulu takast skal ásetast nærri í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Sýnini eiga at verða tikin í august/september á hvørjum ári

7.4. Sýnini skulu kannast fyri turrstof, glóðitap, pH, redoxpotentiali, innihald av total-fosfor og innihald av kopari og zink. Sýnini skulu lýsast kvalitativt við atliti til fauna, sedimenttjúkd, lukti, liti, konsistensi, um bløðrur síggjast, fóðurspill og fækaliir.

7.4. Sýnini skulu takast og kannast av einari starvsstovu, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, og útreiðslurnar til sýnistøku og kanning skal gjaldast av alaranum.

7.5. Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann krevja prógv fyri, at krøvini í samband við óljóð verða fylgd.

7.6. Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann broyta innaneftirlitsskipanina á alibrúkinum, so at tað gerst meiri hóskandi.

8. **Rakstrareftirlit**

8.1. Ein rakstrarjournalur skal førast dagliga yvir alibrúki. Rakstrarjournalurin skal innihalda upplýsingar um fóðurnýtslu, vaksinur og upplýsingar um, hvussu nógvur fiskur er sleptur út í ringarnar og hvussu nógvur er tikin, hvussu nógvur fiskur er deyður í ringunum og hvussu nógvur er sloppin.

8.2. Um sjúka kemur í skal nøgd og slag av heilivági, og tíð fyri viðgerð, førast inn í journalin.

8.3. Rakstrarjournalurin skal havast í varðveitslu á alibrúkinum, vera atkomandi hjáeftirlitsmyndugleikanum og kunna vísast fram, um tað verður kravt. Journalurin skal goymast í 5 ár.

8.4. Tað skal gerast ein árlig uppgerð, sum skal innihalda fylgjandi upplýsingar:

- Útseting av smolti, vekt og mongd.
- Vaksinustøðuna hjá tí útsetta smoltinum.
- Nettoframleiðsla, vekt eftir slaktingina.
- Bruttoframleiðsla, vekt áðrenn slaktingina.
- Deyður fiskur, vekt.
- Sloppin fiskur, mett vekt.
- Framleiðslumongd, sum er tann fiskanøgd, sum er á alibrúkinum pr. 31/12, samanlagt við bruttoframleiðsla, deyður fiskur, sloppin fiskur minus fiskanøgd á alibrúkinum pr 1/1 plus nøgdin av útsettum smolti í tíðarskeiðnum.
- Fóðurnýtsla, vekt, liðað sundur á slag og samanseting.
- Útroknaður fóðurkvotientur, sum er kg. fóðurturrstof pr. kg. framleiðslumongd.
- Heilivágs og kemikaliunýtsla, við upplýsingum um mongd, slag og samanseting.
- Mongd av lívrunnum burturkasti, hvussu tað er viðgjørt og hvørjum tað er latið.
- Mongd av vandamiklum burturkasti, sum er latið til KOB/IRF.
- Innaneftirlitsdata (sum lýst undir punkt 7).

Ársuppgerðin skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í seinasta lagi 1. februar í tí eftirfylgdandi árinum, fyrstu ferð í januar 1999.

**Almennar treytir**

Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting. Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlitið við støðini. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

**Kæruvegleiðing**

Henda avgerð kann kærast til Føroya Landsstýri, sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum síðani sendir kæruna til Føroya Landsstýri við teimum skjølum, sum eru í málinum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kæru freistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Tórshavn, hin 24. januar 1998.

Vinarliga

Bárður Enni,
stjóri

Jacob P. Joensen,
deildarleiðari